## Reglur um søvn og savnstilfar á Føroyamálsdeildini

**Søvn**
Savnstilfar á Føroyamálsdeildini er varðveitt í hesum savnsformum:

seðlasøvn
kort- og myndasavn
bandasavn
handritasavn
teldugrunnar

Tilfarið í søvnunum hoyrir undir ymisk fakøkir og kann tí skiftast sundur í vísindasøvn. Á deildini eru hesi vísindasøvn:

Orðasavn
(tilfar: seðlasavn, elektroniskt tekstasavn)

Staðanavnasavn
(tilfar: handrit/listar, kort, myndir, seðlasavn, bond, teldugrunnar)

Fólkanavnasavn
(tilfar: teldugrunnar, (seðlasavn))

Málførasavn
(tilfar: bond, kartotek)

Fólkaminnissavn (skaldskapur av manna munni)
(tilfar: handrit, bond)

Bókmentafrøðilig handrit

**Reglur um savnstilfar**
Savnstilfar, sum verður goymt í søvnunum á Føroyamálsdeildini, er - og eigur at verða skrásett sum - ogn hjá deildini og kann ikki verða latið út av deildini. Í serligum førum kunnu avtalur verða gjørdar um, at tilfar, sum onnur eiga, kann verða latið deildini í varðveitslu (deponerað á deildini).